# Uttanríkis- og mentamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 14. apríl 2020 |
| Mál nr.: | 20/00281 |
| Málsviðgjørt: | AJ/MN/TH |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

## Uppskot til

## Kunngerð
## um
## útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya

Við heimild í § 3, stk. 4 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012 ,verður ásett:

### Kapittul 1
### Stevnumið, bygnaður og allýsingar

**§ 1.** Útbúgvingarnar á Fróðskaparsetri Føroya eru akademiskar útbúgvingar, sum geva lesandi ástøðiligar og verkligar førleikar og kunnleikar í vísindaligum háttaløgum og evnum.
*Stk. 2.* Útbúgvingarnar eru skipaðar sambært Bologna-ásetingunum í European Credit Transfer and Accumulation System (ECTS). 60 ECTS samsvara einum ársverki.
*Stk. 3.* Útbúgvingarnar eru:
1) Bachelorútbúgving, sum telur 180 ECTS
2) Bachelorútbúgving, ið er yrkisrættað, sum telur upp til 240 ECTS
3) Masterútbúgving, sum telur 120 ECTS
4) Ph.d.-útbúgving, sum telur 180 ETCS

*Stk. 4.* Eisini kann Fróðskaparsetrið bjóða út stakskeið, hjánám og eftirútbúgving á øllum útbúgvingarstigum. Fróðskaparsetrið kann bjóða hesar útbúgvingar út móti gjaldi.
*Stk. 5.* Útbúgvingar sbrt. stk. 4 verða lýstar nærri í námsskipan.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn frá rektaranum loyva fráviki frá hesi kunngerð í sambandi við tíðaravmarkað royndarvirksemi og nýskapandi virksemi á hægra útbúgvingarøkinum, sum er í samsvari við § 1.

**§ 2.** Fróðskaparsetrið leggur útbúgvingarnar til rættis við støði í teimum skeiðum, undirvísingartilboðum og valmøguleikum í námsskipan fyri hvørja útbúgving sær, sum eru á Fróðskaparsetrinum ella við avriksflyting

frá øðrum universitetum.
*Stk. 2.* Útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya skulu geva tí lesandi fortreytir fyri framhaldandi at ogna sær førleikar á hægri stigi

## Kapittul 2
## Útbúgvingarsløg og skipan av útbúgvingum

*Bachelorútbúgving*

**§ 3.** Bachelorútbúgvingin skal geva lesandi innlit í fakøki og kunnleika til vísindalig ástøði og háttaløg, og førleikar at søkja sær vitan. Hon skal menna førleikan til at orða og skilmarka faklig greiðsluevni, til at lýsa, greina og tulka tey og soleiðis geva førleika til sjálvstøðugt arbeiði. Harumframt er bachelorútbúgving støði undir akademiskari framhaldsútbúgving.
*Stk. 2.* Staðið bachelorprógv gevur rætt til heitið *bachelor*.

**§ 4.** Bachelorútbúgving er í minsta lagi 180 ECTS.
*Stk. 2.* Bachelorútbúgving kann vera í einum fakøki ella fakliga samansett.
*Stk. 3.* Námsskipan, sum rektarin skal góðkenna eftir tilmæli frá dekaninum, verður gjørd fyri hvørja einstaka bachelorútbúgving.
*Stk. 4.* Námsskipan verður gjørd fyri hvørja einstaka ískoytisútbúgving.
*Stk. 5.* Staðið bachelorprógv í sjúkrarøktarfrøði gevur lesandi rætt til løggilding sum sjúkrarøktarfrøðingur sbrt. Kongelig anordning nr. 353 af 21.12.1959, hvorved lov om sygeplejersker sættes i kraft på Færøerne, som senest ændret ved kongelig anordning nr. 217 af april 1988.

**§ 5**. Bachelorritgerð er kravdur partur av bachelorútbúgvingini.
*Stk. 2.* Ritgerðin skal prógva evnini hjá tí lesandi at nýta vísindaligt ástøði og háttalag í arbeiðinum við einum avmarkaðum evni.
*Stk. 3.* Ritgerðarevnið skal vera avmarkað soleiðis, at arbeiðið við ritgerðini í minsta lagi svarar til 15 ECTS.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann gera undantak til ECTS-kravið sbrt. stk. 3.
*Stk. 5.* Tann lesandi velur ritgerðarevnið í samráði við vegleiðara, sum hevur tann neyðuga førleikan, og sum av útbúgvingarleiðara er góðkendur til hetta. Útbúgvingarleiðarin staðfestir ritgerðarevnið.

**§ 6.** Fróðskaparsetrið kann gera ískoytisútbúgvingar til bachelor fyri lærarar, náms- og sjúkrarøktarfrøðingar, útbúnir eftir eldri lógum. Eisini kann Fróðskaparsetrið gera ískoytisútbúgvingar til bachelor til aðrar útbúgvingar við loyvi frá stýrinum eftir tilmæli rektarans. Ískoytisútbúgvingin skal geva tí lesandi kunnleika og innlit í vísindaligt ástøði og háttaløg. Ískoytisútbúgvingin er í minsta lagi 30 ECTS og av hesum skulu minst 15 ECTS vera fyri bachelorritgerðina.

*Masterútbúgvingar*

**§ 7.** Masterútbúgving byggir víðari á bachelorútbúgving, og krøvini eru størri og torleikastigini hægri. Masterútbúgvingin skal menna fakligu vitanina, økja ástøðiliga og háttalagsliga førleikan, sum tann lesandi hevur ognað sær í bachelorútbúgvingini. Hon skal harumframt styrkja sjálvstøðugt arbeiðslag.
*Stk. 2.* Staðið masterprógv gevur rætt til heitið master.

**§ 8.** Masterútbúgving er í minsta lagi 120 ECTS eftir lokna bachelorútbúgving. Masterútbúgving kann vera tvørfaklig, tvífaklig ella í einum faki.
*Stk. 2.* Serlig námsskipan, sum rektarin skal góðkenna eftir tilmæli frá dekaninum, verður gjørd fyri hvørja einstaka masterútbúgving.
*Stk. 3.* Er ivamál um heitið á tví- ella tvørfakligari masterútbúgving, tekur rektarin avgerð í málinum.

**§ 9.** Masterritgerð, ið er sjálvstøðug, er kravdur partur av masterrútbúgvingini.
Stk. 2. Masterritgerðin skal prógva evnini hjá tí lesandi at nýta vísindaligt ástøði og vísindaligt háttalag í arbeiðinum við einum avmarkaðum evni.
*Stk. 3.* Ritgerðararbeiðið svarar til í minsta lagi 30 ECTS.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann gera undantak til ECTS-kravið sbrt. stk. 3.
*Stk. 5.* Tann lesandi velur ritgerðarevnið í samráð við vegleiðara, sum hevur tann neyðuga førleikan, og sum útbúgvingarleiðari góðkennir sum vegleiðara. Útbúgvingarleiðarin staðfestir ritgerðarevnið.

*Aðrar útbúgvingar*

**§ 10.** Aðrar útbúgvingar eru nærri lýstar í námsskipan. Rektarin skal eftir tilmæli frá dekani góðkenna námsskipanina til hvørja einstaka útbúgving  og landsstýrismaðurin skal góðkenna  útbúgvingarprofilin.
*Stk. 2.* Útbúgvingar sbrt. stk. 1 eru fevndar av §§ 1-2 og §§ 12-14.

*Stakgreinalestur*

**§ 11.** Stakgreinalesandi eru lesandi, sum fylgja undirvísing og fara til próvtøku í einstøkum skeiðum uttan at vera innskrivað til fullan lestur.
*Stk. 2.* Stakgreinalesandi søkja um upptøku til hvørt skeið sær og skulu lúka somu krøv til upptøku sum onnur lesandi.
*Stk. 3.* Stakgreinalesandi verða tikin inn, um pláss er á skeiðinum.
*Stk 4.* Fróðskaparsetrið kann krevja skeiðsgjald fyri stakgreinalestur.

*Lestrarvist*

**§ 12.** Lesandi á Fróðskaparsetri Føroya kunnu søkja um at fara á lestrarvist sum part av útbúgvingini.
*Stk. 2.* Fróðskaparsetrið ásetir nærri innanhýsis reglur og mannagongdir í sambandi við lestrarvist.

*Gestalesandi*

**§ 13.** Lesandi, ið eru innskrivað til lestur á øðrum hægri lærustovuni, kunnu søkja um at verða gestalesandi á Fróðskaparsetri Føroya.
*Stk. 2.* Gestalesandi fylgja undirvísing og fara til próvtøku í einstøkum skeiðum uttan at verða innskrivað til ávísa útbúgving.
*Stk. 3.* Gestalesandi kunnu í mesta lagi taka 60 ECTS á Fróðskaparsetri Føroya fyri hvørja útbúgving.
*Stk. 4.* Fróðskaparsetrið ásetur nærri reglur fyri innskriving av gestalesandi.

*Uttansetursundirvísing*

**§ 14.** Fróðskaparsetur Føroya kann gera avtalur um samstarv um undirvísing við aðrar hægri útbúgvingarstovnar, um mett verður, at neyðugi undirvísingarførleikin innan ávíst fakøki ikki finst á Fróðskaparsetrinum. Talan kann bæði vera um samstarv við aðrar hægri útbúgvingarstovnar og um samstarv við klinisk útbúgvingarstøð.
*Stk. 2.* Í mesta lagi 60 ECTS av bachelorútbúgving og 30 ECTS av masterútbúgving kann leggjast uttanhýsis.
*Stk. 3.* Bachelorútbúgvingin í sjúkrarøktarfrøði er undantikið tí í stk. 2 nevnda kravi.
*Stk. 4.* Í teimum førum, har undirvísing verður løgd uttanseturs, skal hetta verða upplýst í námsskipanini.

*Lestrarvegleiðingin*

**§ 15.** Fróðskaparsetrið bjóðar lesandi lestrarvegleiðing um útbúgvingarnar á setrinum og starvsmøguleikar, ið útbúgvingarnar geva. Eisini veitir Fróðskaparsetrið lesandi vegleiðing í sambandi við lestrarvist.
*Stk. 2* Harumframt kann lestrarvegleiðingin ráðgeva lesandi við sosialum, persónligum og fíggjarligum avbjóðingum í sambandi við lestur.

*Stk. 3.* Lestrarvegleiðingin skal eisini vegleiða um rættindi og skyldur hjá tí lesandi í sambandi við lesturin.

## Kapittul 3
## Námsskipan

**§ 16.** Fróðskaparsetrið ásetur nærri reglur fyri útbúgvingarnar í námsskipan fyri hvørja útbúgving sær.
*Stk. 2.* Námsskipanin skal innihalda:
1) Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum
2) Útbúgvingarstig
3) ECTS áseting
4) Upptøkukrøv
5) Endamál við útbúgvingini
6) Lýsing av almennum og fakligum førleikum
7) Útbúgvingarlæruúrtøkur
8) Ásetingar um:
    a. Bygnaðin í útbúgvingini
    b. Innihald og ECTS í einstøku fakøkjunum
    c. Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini
    d. Ritgerðir
    e. Metingarhættir
    f. Próvtøkur
    g. Undirvísingarmál
    h. Góðskriving
    i. Farloyvi
    j. Serlig atlit
    k. Altóða útbúgvingarmøguleikar, lestrarvist
    l. Luttøkuskyldu
    m. Starvsvenjing
    n. Eftirmeting av útbúgving og skeiðum
    o. Kærumøguleikar
    p. Ritstuldur
    q. Nær lesandi í seinasta lagi skal hava staðið endaligt prógv
    r. Treytir um broyting í námsskipan

*Stk. 3.* Tá nýggj námsskipan verður samtykt, og tá størri broytingar verða gjørdar, skal dekanurin kunna tey lesandi um tær, so skjótt tær eru samtyktar. Sum meginregla eru broytingarnar galdandi frá komandi lestrarársbyrjan.
*Stk 4.* Tey lesandi skulu kunnast um, í hvønn mun tey kunnu fylgja broyttu skipanunum ella fylgja eldri skipanum og um møguligar tíðarfreistir í hesum sambandi.
*Stk. 5.* Námsskipan til bachelorútbúgving í sjúkrarøktarfrøði skal sendast til hoyringar hjá heilsuverkinum, Nærverkinum, Uttanríkis- og mentamálaráðnum og løggildingarmyndugleikanum, áðrenn hon verður staðfest.
*Stk. 6.* Námsskipan til bachelorútbúgving til yrkisrættað starv sum fólkaskúlalærari skal sendast til hoyringar hjá landsstýrismanninum.
*Stk. 7.* Námsskipan til bachelorútbúgving til yrkisrættað starv sum námsfrøðingur skal sendast til hoyringar hjá landsstýrismanninum, Almannaverkinum og Kommunufelagnum.
*Stk. 8.* Allar námskipanir skulu liggja alment úti á heimasíðu setursins.

## Kapittul 4
## Prógv

**§ 17.** Fróðskaparsetrið skrivar út prógv fyri útbúgving, sum er staðin, í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at studenturin hevur staðið seinastu próvtøkuna
*Stk. 2.* Á próvnum skal standa:
1) navn og búmerki útbúgvingarstovnsins á føroyskum og enskum
2) navn og føðingardagur hjá tí, sum hevur staðið útbúgvingina
3) heitið, sum útbúgvingin gevur rætt til, á føroyskum og enskum
4) heimildin fyri útbúgvingini
5) undirskrift hjá rektara og dekani

*Stk. 3.* Við próvnum skal fylgja próvtalayvirlit á føroyskum og enskum, ið fevnir um:

1) skeiðini, sum eru staðin,
2) próvúrslitini
3) flutt avrik frá øðrum útbúgvingarstovnum
4) undirskrift hjá fyrisitingarstjóranum

*Stk. 4.* Sum fylgiskjal til prógvið letur Fróðskaparsetrið eitt Diploma Supplement á enskum, sum samsvarar við ásetingarnar hjá ES-kommissiónini, Evroparáðnum og UNESCO/CEPES.

*Stk. 5.* Lesandi, sum gevst, hevur rætt til váttan fyri tær próvtøkur, ið hann hevur staðið.

*Stk. 6.* Gestalesandi, stakgreinalesandi, lesandi á summarskeiðum og samsvarandi styttri skeiðum við próvtøku, hava rætt til eina skeiðsváttan umframt útskrift úr próvbókini, sum lýsir heitið á skeiðinum, ECTS, próvtal og yvirlit yvir próvtalastiga. Somuleiðis hava lesandi, sum á fullgóðan hátt hava luttikið í undirvísingini í stakskeiðum, uttan at hava verið til próvtøku, rætt til skeiðsváttan.

*Stk. 7.* Fróðskaparsetur Føroya goymir upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at útskriva prógv, í 30 ár. Eftir hetta verða upplýsingarnar latnar Tjóðskjalasavninum í varðveitslu.

## Kapittul 5
## Gildiskoma og skiftisásetingar

**§ 18.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Samstundis fara úr gildi kunngerð nr. 85 frá 9. juni 2009 um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 ella seinni og relgur um alment próvskeið í Føroyskum, sum broytt við kunngerð nr. 111 frá 31. august 2011 og kunngerð nr. 19 frá 3. mars 2011 um útbúgving til sjúkrarøktarfrøðing (B.SC.CUR) og kunngerð nr. 140 frá 13. november 2009 um útbúgving av fólkaskúlalærarum og námsfrøðingum.

*Stk. 3.* Lesandi, sum er innskrivaður til útbúgving á Fróðskaparsetrinum áðrenn 1. august 2019, kunnu gera seg lidnan eftir teirri gomlu kunngerðini, gomlum lesiætlanum og námsskipanum.

*Stk. 4.* Lestur sambært stk. 3 skal í seinasta lagi vera lokin innan lestrarársbyrjan 2025.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 14. apríl 2020.

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

# Heitið á skjalinum